# Risa KT-verkætlan

**Almannastovan og Atlantstøkni, sum er partur av NEMA-samtakinum, settu í farnu viku sjøtul á stóra KT-verkætlan**

KUNNINGARTØKNI
*Tíðindaskriv*
*jakup@sosialurin.fo*

Í farnu viku varð sjøtul settur á eina av Føroya størstu KT-verkætlanum. Talan er um at menna Almannastovuni eina nýggja KT-skipan, ið skal loysa av tær átta, ið frammanundan eru.

Við nýggju skipanini fær Almannastovan eina og somu skipan, ið skal nøkta tørvin tey nógvu komandi árini.

Heildarskipanin, ið fer at streymjavna og nútímansgera almannaverkið, inniheldur m.a. modul til forsorg, pensjónir, dagpening, journalisering og málsviðgerð.

- Skipanin tryggjar, at allar tænastuveitingar lúka treytir og krøv frá lóggávum og reglum. Harnæst fer skipanin at gera sítt til, at vit fáa eitt vælvirkandi og smidligt almannakervi, sigur Petra Johnsdóttir Joensen, stjóri á Almannastovuni.

Umframt at Almannastovan fer at kunna veita smidligar og dagførdar tænastur, er talan um eitt stórt frambrot í føroyskum KT-høpi.

- Vit skulu altíð taka atlit, ið javnviga millum krøv, ynski og skyldur, sigur Poul Geert Hansen, aðalstjóri í Almanna- og heilsumálaráðnum.

- Hvar fáa vit mest fyri peniningin, og hvar fær ætlaða loysnin størst árin? Hetta eru spurningar, ið til eina og hvørja tíð skulu kunna svarast út frá einum almennum sjónamiði. Poul Geert Hansen metir, at árinini av hesum útboðnum fara síggjast fleiri ár fram.

Í útboðnum til verkætlanina vóru bæði útlendskar og føroyskar fyritøkur, og tað var Atlants Tøkni, ið er partur av Nema-samtakinum, ið hevði bestu loysnina, tá ið av tornaði.



*Umboð fyri Almanna- og heilsumálaráðið og NEMA skrivaðu í farnu viku undir nýggja sáttmálan*


Runavíkar Kommuna
søkir ***havnaumsjónarfólk***



Runavíkar havn er eitt spennandi og fjølbroytt arbeiðspláss. 3 fólk eru í føstum starvi. Árliga vitja umleið 1600 skip havnirnar í Runavíkar kommunu.

Av tí, at 1 av havnaumsjónarmonnum okkara fer frá fyri aldur, søkir Runavíkar kommuna eftir 1 havnaumsjónarfólki at byrja 1. februar 2008.

**Førleikakrøv o.a.**
Arbeiðið er burturav skipað í skiftandi vaktum undir leiðslu av havnarstjóranum og í tøttum samstarvi við onnur starvsfólk hjá kommununi.

**Av umsøkjarum vænta vit hesa førleikar**
- Viðkomandi útbúgving t.d. sum skipsførari
- Góðar málsligur førleikar, bæði í skrift og talu, í føroyskum, norðurlendskum og enskum.
- Teldukunnleiki.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett eftir sáttmála millum Starvsmannafelagið og Kommunala arbeiðsgevarafelagið í lønarflokki 4,1. - 7. stig. Harafturat verður veitt ein føst mánaðarlig viðbót fyri vaktir.

**Meiri fæst at vita**
Meiri fæst at vita at venda sær til havnastjóran, Jón Nónklett, tel 288880.

**Umsóknir**
Umsóknir, saman við upplýsingum um útbúgving og royndir og møguligum viðmælum, skulu sendast til:

Runavíkar kommunu
Heiðavegur 26
FO 600 Saltangará.

- og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin 13. desember 2007, kl. 12.00.

Runavíkar kommuna tilskilar sær rætt til frítt at velja millum innkomnar umsóknir, ella onga at taka.

Runavíkar kommuna

Heiðavegur 26 · 600 Saltangará · Tel 417000 · Faks 417001
runavik@runavik.fo · www.runavik.fo

KREA





# Jól í Glasstovuni

**1. desember, 7. desember, 14. desember og 15. desember bjóðar Glasstovan stóra jólamatskrá**

**5 rættir:**
- Føroyskur tallerkur.
- Toskanakki við safransós og saute.
- Berberidunnubringa og svínalundir við lakaðum blommum og rótfruktum, pom anna og orangessós.
- Osta volauvent.
- Mandlurís við karamelkremi og kanelísi.

**Prísur fyri hvønn kr. 525,-**

**Íroknað prísin er:**
**5 rættir, drykkivørur og dansur.**

**Bíleggið borð á tel. 317500**
**ella á hf@hotelforoyar.fo**

GLASSTOVAN
*The Favourite Restaurant*

Tel 31 75 00 • hf@hotelforoyar.fo

hotelforoyar.fo